## Partarnir práta framvegis



Enn er onki nýtt at frætta frá í trætuni millum pedagogarnar, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Partarnir tosaðu saman seinnapartin í gjár, og skulu aftur práta í dag.

Tiltøkini eru slept fyribils, og so leingi samband er í millum partarnar fær sáttmálaslitið ongar avleiðingar. Men við Sosialin í gjár segði Jarvin Feilberg Hansen, at hóast tiltøkini nú eru løgd á hillina, so veit felagið akkurát, hvat skal gerast, um tað verður brúk fyri tí.

Tað týdningarmikið at fáa fram, at enn er ikki talan um samráðingar, men at tað er í einum sera positivum anda, at partirnar tosa saman.

## Yvir 2.000 undirskriftir innkomnar

Undirtøkan fyri at broyta §266b tykist at vera ógvuliga stór. Minni enn eina viku eftir at farið varð undir at savna inn undirskriftir í Føroyum, eru fleiri enn 2.000 undirskriftir komnar inn.

Samskipararnir siga, at tað framvegis ber til at senda teldubræv til grein266b@hotmail.com við navni, bústaði og føðingardegi.

# EIN BAKTERIUBUMBA

**Matstovan Marco Polo var so skitin mikudagin, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan stongdi staðið**

MATUR

*Rigmor Dam og Rólant Waag Dam*
*rigmor@sosialurin.fo; rolant@sosialurin.fo*

Nógvar matstovur bjóða sjálvtøkuborð á middegi, og tað er vorðið alt meira vanligt, at fólk fara út at eta í døgurðatímanum. Og tað er ein sannroynd, at góðska og prísur eru ójøvn og kappingin um kundarnar er sera hørð.

Tey, sum ótu í Marco Polo mikudagin fingu eina óhepna uppliving, og trý teirra gjørdu ikki matari enn at ringja á Heilsufrøðiliga Starvsstovuna at kæra sína neyð, eftir heldur eina keðiliga vitjan á vesinum.




### Stongt við brestin

Av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni verður sagt, at tey fóru beint á staðið og at har stóð somikið illa til, at tey áløgdu eigaranum Norden Manai at stongja staðið beinanvegin.

Í eftirlitsfrágreiðingini skrivar Heilsufrøðiliga Starvsstovan, at tey hava verið á ófráboðaðari vitjan tann 1. november, vegna klagur frá fólki um, at tey eru vorðin sjúk:

*Køkurin er sera skitin og ílatið við hondsápu riggar ikki. Maturin í buffetini er ikki nóg heitur. Maturin verður tiðnaður í stovuhita, og matur, ið eigur at verða goymdur á køl, stendur eisini úti í stovuhita. Goymslurnar eru skitnar og órudduligar.*

Í avgerðini stendur:

*Samb. §33 og 35, stk 4 í matvørulógini, verður álagt Marco Polo at lata aftur beinanvegin. Latast kann upp aftur, tá køkur og goymslur eru vaskað og ruddað (eisini amboð, íløt og kuldaskáp) og sýnd av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.*

Heilsufrøðiliga Starvsstovan sigur, at bjóðast kann frá buffetini, tá trygd er veitt fyri, at maturin kann goymast við rættan hita! (hægri enn 65 stig)

Harumframt verður álagt Marco Polo at gera skrivligar mannagongdir fyri virking og goymslu av mati. Mannagongdirnar skulu verða góðkendar av Heilsufrøðiligu Starvstovuni innan 15. november 2006.

### Sjónliga skitið

Sambært Jónhild Hermansen frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni var tað somikið greitt, at reinførið ikki var í lagi, at tey ikki mettu tað vera neyðugt at gera kanningar av matinum, ið eftir var.

– Maturin, ið fólk siga seg vera vorðin sjúk av, er etin, og tí er torført at ávísa, hvønn rætt tey eru vorðin sjúk av, sigur hon. Og hon vísir á, at tað nú er álagt eigaranum at fáa reinføri í lagi aftur, um matstovan skal lata upp aftur.

### Sundurkókað buffét

Ein av kundunum, sum fekk ilt í búkin og rennukatrinu aftaná vitjanina sigur, at maturin, sum var á sjálvtøkuborðinum mikudagin var beinleiðis ólekkur.

– Har vóru eini fýra samankókaðir rættir, sum vóru so útkókaðir, at kjøtið ikki var í bitum longur, men trevsuttir slintar, eins og long hár, í einari slímutari lunkaðari sovs. Tað bar ikki til at síggja mun á grønmeti og kjøt, men okkurt purruskapilsi var í øllum rættum. Alt smakkaði av sama kryddi, men litirnir vóru ymiskir. Á hinari síðuni stóðu tríggjar lunkaðar sovsir, og eitt stórt fat av teimum allar bíligastu hønsarungabitunum, har ein fær 2 kilo fyri 20 krónir. Hønsarungabitarnir vóru so nógv stoktir, at ongin munur var á kjøti og beinum, sigur kundin, sum hevði vaml restina av degnum.

## Nú hava vit ruddað

Tá matstovan varð stongd mikudagin, fóru starvsfólkini undir at fáa reinførið í rættlag, sigur Nordin Manai, eigari av Marco Polo.

Nordin Manai sigur við Sosialin, at tað er so skjótt at tað verður órudduligt og skitið í køkinum og í goymsluni, tá tey hava so nógv at gera í døgurðatímanum. Hann sigur eisini, at tey vóru glað, tá eftirlitið kom á vitjan.

– So kunnu vit fáa greitt at vita, hvat vit skulu gera betur. Vit stongdu matstovuna mikudagin klokkan 3 og so vaskaðu vit allan dagin, so vit kundu lata upp aftur hósdagin, sigur hann. Og hann ivast eisini í, um tað er av matinum har, at fólkini eru vorðin sjúk, tí maturin var ikki kannaður, tí hann varð etin, tá eftirlitið kom á vitjan.

Hann upplýsir, at trý fólk arbeiða í køkinum og hann metir tað vera nóg nógv.

– Mikudagin hevði gentan, sum serverar sløkt fyri hitaanlegginum í buffetini, tí hon visti ikki at kontaktin skuldi vera tendrað. Hetta hevur hon nú fingið boð um, sigur Nordin Manai.


HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN
FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY
Matvørudeildin
Eftirlitsblað
Marco Polo
[illegible]

## Úr frágreiðingini

Av átta ymsum rættum á buffetini hjá Marco Polo mikudagin, var tað bara hakkibúffurin, sum hevði neyðuga hitan og sum kundi góðkennast.

Sostatt kundu sjey av átta rættum ikki góðkennast. Tað er nóg ringt í sjálvum sær, men í køkinum var heilt galið.

Hondsápuílatið var tipt. Eplarestir frá degnum fyri vóru á borðinum. Hillar, borðbein og ein veggur vóru skitin. Tað sama var eitt rívijarn og ein bolli, sum lá í einum mjølsekki. Haraftrat lógu tvær steikir á borðinum og vóru tær máldar at vera 24 stig heitar. Ein heimagjørdur dressingur stóð í spannum uttan at vera á køl. Eitt køliskáp var eisini skrásett sum skitið og at tað luktaði.

Í kjallaranum var skilið ikki betri. Eitt køliskáp var 14 stig heitt. Har lógu hønsarungar og tiðnaðu í eini balju á gólvinum, og í eini frystiboks lógu óinnpakkaðar pannukøkur og ráir búffar hvørt um annað.

## Umbering til lesaran

Greinin um Marco Polo, sum sæst her á síðuni, var ein av ávísingum okkara á forsíðuni í blaðnum í gjár. Eitt mistak hevði tó við sær, at síðan sjálv als ikki var í blaðnum, og verður hon tí prentað umaftur. Vit biðja lesaran halda okkum til góðar.